Kommunufelagið

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
4. mars 2016

Okkara j.nr.
16-00854-14

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j. nr. 15/00827

**Viðv.: Uppskoti til løgtingslóg um val til kommunur**

Við skrivi, dagfest 3. februar 2016, hevur Kommunufelagið fingið omanfyri nevnda lógaruppskot til hoyringar.

Av fylgibrævinum framgongur, at einstøku kommunurnar somuleiðis hava fingið uppskotið til viðmerkingar.

Kommunufelagið hevur viðgjørt uppskotið, og í viðgerðini m.a. biðið kommunurnar um teirra viðmerkingar.

Sum skilst hava nakrar kommunu somuleiðis sent teirra viðmerkingar beinleiðis til Ráðið, í ávísum føri við avriti til okkara.

Kommunufelagið hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

**Generellar viðmerkingar**

Tað er serliga ætlaða broytingin í valstøðunum, ið hevur fingið mestu umrøðuna millum kommunurnar, og sum heild kann sigast, at flestu kommunurnar eru ivasamar um hesa broyting.

Høvuðsendamálið við broytingini er sum skilst, at eitt valstað við færri enn 100 veljarum, kann verða niðurlagt, um kommunustýrið tekur avgerð um hetta. Grundgevingin fyri hesi broyting er, at smáu valstøðini ikki í nøktandi mun taka atlit til veljaraanonymitet.

Kommunufelagið fekk líknandi lógaruppskot til hoyringar fyri góðum ári síðani. Víst verður í tí sambandi til hoyringssvar frá Kommunufelagnum til Almannamálaráðið, dagfest 28. januar 2015. Kommunufelagið vísti tá m.a. á, at tann kanning, sum sipað varð til, sum var grundarlag fyri uppskotinum um at niðurleggja valstøð, ikki var løgd fram saman við lógaruppskotinum, so at almenningurin fekk høvi til at eftirkanna grundarlagið aftan fyri uppskotið. Henda kanning er nú løgd fram, men Kommunufelagið undrast yvir, at ongin serfrøði innan valgransking og kommunupolitikk – her á landi og uttanlanda – er spurd, áðrenn lógaruppskotið verður lagt fram.

Kommunufelagið skal taka aftur í aftur høvuðsspurningar í uppskotinum.

**Viðvíkjandi valstøðunum**

Sum nevnt í hoyringssvari okkara frá 28. januar 2015, metir Kommunufelagið, at tá fyriliggjandi uppskotið mælir til minstu stødd á 100 veljarar, meðan hjálagda kanningin mælir til at, eitt valstað eigur at hava í minsta lagi 175 til 230 veljarar, og tað sambært viðmerkingunum er orsakað av, at 200 sambært landsstýrismanninum er eitt ov ógvusligt lop, so sýnist sum um, at talið 100 er tikið úr leysum lofti, sum ein roynd á einhvønn hátt at náa einum betri anonymiteti enn í dag.

Rætt er, at rætturin til at velja anonymt, er grundleggjandi í demokratisku skipanini. Hinvegin, so stendur anonymitetur ikki sum eitt einsamalt atlit. Serliga nú, tá talan er um kommunuval, er atlitið til *lokala* fólkaræðið eisini grundleggjandi. Samstundis má trygd vera fyri, at broyting í verandi skipan, fyri at tryggja ein størri anonymitet, ikki hevur við sær aðrar óhepnar avleiðingar. Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at víst hevur verið á, at á smærri valstøðum, ið eru í vanda fyri at verða løgd niður, er fólkasamansetingin soleiðis háttað, at har eru nógvir eldri veljarar, og um tað gerast truplari hjá hesum at koma at einum valstaði at velja, t.d. tí at vegurin til nærmasta valstað gerst ov langur og trupul, so er vandi fyri, at vallutøkan fellur og áhugin fyri valinum samstundis fellur.

Útfrá einum demokratiskum sjónarmiði, er tað eyðsæð, at tað hevur størri týdning, at varðveita høgu valluttøkuna á smærru valstøðunum, heldur enn at niðurleggja hesi fyri at tryggja størri veljaraanmonymitet. Neyvan ynskir nakar, at tiltakið, ið hevur til endamáls at tryggja størri anonymitet, skal hava ta avleiðing, at grundleggjandi demokratiska handlingin - valluttøkan - fellur.

Eisini undrast Kommunufelagið á, at henda, eftir umstøðunum, grundleggjandi broyting, verður framd, uttan at onnur faklig, t.d. samfelagslig, hagfrøðislig, granskingar-atlit og royndir, enn ein sannlíkindarokning fyri, nær ein kann roknast at vera anonymur í sambandi við eitt val, eru tikin við í metingina.

Kommunufelagið mælir til, at atlitið til størri anonymitet verður tryggjað á annan hátt, t.d. við at verandi valstøð verða varðveitt, men at arbeitt verður víðari við einum møguleika fyri einum samlaðum (ella fleiri, um tørvur er á tí) uppteljingarstaði fyri kommununa, soleiðis at valkassar, á tryggan og demokratiskt forsvarligan hátt, kunnu flytast frá einum minni valstaði til eitt størri uppteljingarstað. Mett verður ikki, at alternativi møguleikan, at velja við brævatkvøðu, er nøktandi.

Somuleiðis mælir Kommunufelagið til, at hugtakið „valstað“ verður betri kjølfest í øllum vallógum, soleiðis at veljarin ikki skal skifta valstað, alt eftir um talan um er kommunuval, løgtingsval, fólkatingsval, ella annað.

Undir øllum umstøðum mælir Kommunufelagið til, at t.d. broytingar í valstøðum, fyri at tryggja anonymitet, verða gjørd sambært hollari fakligari tilráðing, ið verður neyvt fylgd, og at broytingarnar og skipanirnar verða grundleggjandi eins, uttan mun til, um talan er um val til kommunuval, løgtingsval, fólkatingsval, fólkaatkvøðu ella annað.

**Viðvíkjandi brævatkvøðum**

Uppskotini til reglur fyri at lata brævatkvøður tykjast nakað fløktar í núverandi uppskoti, og kundi hetta verið orsakað av, at broytingar í skipanini við brævatkvøðum, er ein avleiðing av yvirskipaða málinum um, at leggja valstøð niður.

Reglan í § 22, stk. 1, um at „.. brævbjálvin er komin valstýrinum í hendi, áðrenn atkvøðugreiðslan endar“ eigur at verða broytt. Brævbjálvaatkvøður eiga at vera inni, áðrenn vanliga valið byrjar.

Fyri at umsita brævatkvøður á besta hátt, eigur seinasta freist at lata brævatkvøður vera seinast 3 dagar, kanska longri, áðrenn sjálvt valið. Annars er skjótt, at fløkja verður í vallistanum, sí § 15, stk. 3. Hinvegin skuldi ikki verið neyðugt at sett regluna í § 19 um, at „Í øllum øðrum førum kann í fyrsta lagi verða atkvøtt 1 viku áðrenn valdagin“. Tað man altíð vera ein fyrimunur at hava brævatkvøðurnar inni í góðari tíð.

Kommunufelagið metir, at hædd ikki í nóg stóran mun er tikin fyri tí møguliga eyka arbeiði, ið tað kann hava á valstaðnum, at brævatkvøður kunnu koma inn valdagin.

**Uppgerð av valinum**

Sambært § 27 er ætlanin at broyta uppgerðarháttin til skipanina við størsta brøki, á sama hátt sum til løgtingsval, soleiðis at persónliga atkvøðutalið á hvørjum lista er avgerandi fyri, hvør verður valdur. Tað kann tykjast ógvusligt í einum lokalum vali at innføra eina valgátt á 1/x ( sum t.d. 1/11 ella 9,1 % í eini miðal stórari kommunu). Spennið í valgáttini verður millum 5,9 og 33,3 ímillum kommunurnar, og ójavnin (hægri valgátt) veksur, jú smærri kommunurnar eru. Ávísar kommunur hava møguleika sjálvar at lækka valgáttina við at hækka um talið av bygdaráðslimum, meðan tær sum hava hægstu valgáttina, tær smáu kommunurnar, ikki hava henda møguleika. Hetta verður mett sum ein demokratiskur trupulleiki, ið eigur at viðgerðast nærri, um hátturin skal broytast.

Um farið verður til ein útrokningarhátt sum landsumsitingin er von við, og forrit eru ment sum roknar út umboðini, verður mælt til, at sama forritið verður tillagað soleiðis, at tað eisini kann brúkast í sambandi við kommunuval. Hetta vil geva størri vissu og trygd fyri, at upperðin av valinum í einstøku kommununi verður gjørd rætt. Skipanin liggur, okkum kunnugt, hjá Kringvarpinum, við atgongustýring.

Alternativið er, at rokniark (skabilón) verður gjørd til kommunurnar at brúka, í sambandi við uppgerðina av valinum.

**Tøknilig atlit**

Yvirskipað sæð, verður mælt til at tryggja, at ásetingarnar í lógaruppskotinum ikki forða fyri talgildari menning av arbeiðsgongum v.m. í sambandi við kommunuval.

Kommunufelagið

Sum nevnt í okkara hoyringssvari frá 28. januar 2015, tekur uppskotið til broytingar ikki nøktandi atlit til tøkniligar møguleikar. Valini kundu t.d. verið munandi skjótari avgreitt, um t.d. vallistar og sjálvi valini vóru digital. Veljarin kundi valt á teldu við einum "touch" skermi. Nógvar loysnir kunnu hugsast, og skal Kommunufelagið ikki vísa á neyvt, hvørjar tær eiga at vera, men meira yvirskipað vísa á, at nútímans tøkniligir møguleikar ikki tykjast at vera gagnnýttir nevnivert í uppskotunum.

**Ítøkiligar viðmerkingar til einstøku ásetingarnar**

Til § 3 stk. 1

Í uppskotinum er ásett, at "Kommununevndin hevur 3 limir, og 1 tiltakslim fyri hvønn limin."

Mett verður, at ein skipan við persónligum tiltakslimum verður ov stirvin í eini nevnd, ið er mannað við leikfólki. Um tann persónligi tiltakslimurin ikki fær møtt fyri valda limin, skal kommunustýrið tilnevna nýggjan lim. Skotið verður upp, at orðingin verður broytt til at " Kommunuvalnevndin hevur 3 limir, og 3 tiltakslimir."

Í stk. 3 er skotið upp, at landsstýrismaðurin, í seinasta lagi 6 vikur undan valinum kunngerð, 1) nær valdagur er, 2) hvar valevnislistar skulu latast inn, og 3) seinastu freist at lata valevnislistar inn. Til punkt um, at landsstýrismaðurin ásetur valdagin, er einki at viðmerkja, men til punkt 2 og 3 skal viðmerkjast, at hetta er at taka ábyrgdina frá kommunuvalnevndunum, og tað kann ikki góðtakast. Ongar haldbarar og sakligar grundgevingar eru givnar fyri hesi ætlaðu broytingini.

Til § 5

"......*valkort verða send út*".

Mælt verður til at lógarteksturin letur upp fyri, at valkort eisini kunnu sendast veljarum í talgildum formi. Hetta fyri, at lógin ikki skal gerast ein forðing fyri hesum møguleika, tá tøknin er trygg nokk til tess.

Til § 15 stk. 7

Í § 15 stk. 7 er skotið upp, at *"Ikki er loyvt at avmynda ella at miðla hvussu atkvøtt er".* Tað eru ongar serligar viðmerkingar til § 15 stk. 3, og tí er trupult at meta um, hvør hevur ábyrgdina av at tryggja, at hetta ikki hendir, t.d. um ein borgari fremur brot á hesa áseting. Viðmerkingarnar siga ikki hví henda áseting er sett inn í lógina. Hvussu tryggja tey, ið vara av valinum, at hetta ikki verður framt, og hvat um henda áseting verður brotin?. Hvør skal handheva hesa áseting ? Er revsing knýtt at hesi gerð? Hugsað dømi: Eg taki mynd av mínum atkvøðuseðli (hetta er brot á § 15 stk. 7), síðani velji eg at leggja myndina á facebook antin áðrenn valstaðið er afturlatið ella aftaná (hetta er eisini brot á § 15 stk. 7) - ímyndar lóggevari sær, at umboð í valnevndini/stýrinum hava heimild/skyldu at fylgja hesum upp og um ja, hvussu ? Er § 15 stk. 7 fevnt av § 45 um revsing? Um ja, er tað tann, ið hevur ábyrgd av valinum, ið revsast ella er tað viðkomandi, ið veruliga fremur brot á § 15 stk. 7?

Skal seinna lið í ásetingin skiljast sum, at ein ikki kann miðla s.s. skriva/agitera, hvussu ein hevur atkvøtt ella merkir hetta, at ein ikki má senda mynd av sínum atkvøðuseðli? Mælt verður til at nærri at hesi viðurskifti verða greinaði nærri.

Til § 21

Í viðmerkingunum til § 21 stendur, at bert annað av hjálparfólkum kann vera í starvi í fyrisitingini í kommununi. Tað kunnu vera nógvir veljarar, sum ynskja at brævatkvøða heima, og tað kann vera torført hjá valstýrinum at møta í arbeiðstíð fyri at avgreiða brævatkvøður, eitt nú á ellisheimum. Tá er lættari hjá starvsfólkum í fyrisitingini í kommununi at avgreiða ta uppgávuna. Mett verður, at hetta átti at verið broytt, soleiðis at kommunustýrið kann tilnevna hjálparfólk, sum starvast í kommununi, uttan nevndu avmarking.

Til § 22

Í stk. 1 er ásett: “..*Hesin skipar fyri at brævbjálvin beinanvegin verður sendur avvarðandi kommunu*..”

Tað kemur ofta fyri at veljari heldur uppá, at hann hevur rætt til at taka brævatkvøðu við sær til tess at tryggja, at hon kemur fram til tíðina. Mælt verður tískil til at ásett verður í lógini, at brævbjálvin verður sendur við posti. Her verður annars víst til at í vegleiðingini til brævatkvøðurnar stendur, at veljarin sjálvur skal hava frímerki við, tá hann brævatkvøður.

Til § 20-23

Fylgiseðilin til brævatkvøður verður onkutíð nevndur oyðublað. Hetta eigur at verða konsekvensrættað soleiðis, at skjalið antin verður nevnt fylgiskriv ella oyðublað.

Mælt verður til at endurskoða fylgiskrivið/oyðublaðið, av tí at hesi eru ikki serliga brúkaravinarlig og tungt orðað. Tað er sera lítið pláss hjá veljarum at skriva á og eisini eigur at verða umhugsað, um tað er neyðugt við øllum upplýsingunum, sum biðið verður um.

Dømi: T.d. verður spurt um, hvar veljarin er føddur.

Er tað neyðugt?

Tvær ferðir skal veljarin skriva hvørja kommunu hann velur til, men ikki kann fara á val í sjálvan valdagin.

Er tað neyðugt?

Kommunala starvsfólkið, ið váttar fylgisskjalið/oyðublaðið verður nevnt manntalsskrivari.

Kann tað ikki eita starvsfólk.

Á forsíðuni til brævbjálvan, sum fylgisskrivið/oyðublaðið fer í stendur:

Til Bygda(r)Býráðið í_________________________________________

Kann tað broytast til:

Til _______________________kommunu

Til § 20, stk. 2

Víst verður til "løgtingsval", somuleiðis verður í viðmerkingunum á s. 17, 2. reglubrot víst til "løgtingsvalnevndina". Skal hetta ikki broytast til ávikavist "kommunuval" og ""kommunuvalnevndina"?

Til § 23, stk. 3

2 pkt. sigur, at brævbjálvarnir við brævatkvøður skulu í ein "*atkvøðukassa og blandaðir millum hinar atkvøðuseðlarnar*". Hvat er endamálið við at leggja brævatkvøður í kassar við vanligum atkvøðum? Í praksis er hetta við til at leingja uppteljingina, har atkvøðurnar fyrst eru sundurskiltar frá hinum vanligu atkvøðunum allan valdagin. Síðani verða tær lagdar saman við teimum vanligum atkvøðunum, fyri síðani aftur at skula takast frá vanligu atkvøðunum undir uppteljing. Tað er trupult at síggja orsøkina til hesa mannagongd. Brævbjálvarnir líkjast jú frá vanligu atkvøðuseðlunum, ið koma á borðið undir uppteljing. Í pkt. 3 stendur, at "eru fleiri brævatkvøður, skulu allar í sama kassa", merkir tað, at so eru bara brævatkvøður í einum kassa ella at allar brævatkvøður skulu í sama kassa "blandaðar við hinar atkvøðurnar", smb. pkt. 2? Mett verður at fyrra mannagongdin vildi verið praktiskari og tíðarsparandi. Mælt verður til, at lóggevi nágreinar hetta.

Til § 28

Í einum fólkaræði er umráðandi at kunna fylgja við, hvussu valskipanin virkar. Ein máti at lætta um, er at seta eina reglu inn seinast í § 28, at avrit av gerðabókini verður sent skjalagoymsluni í Heilsu- og Innlendismálaráðnum, og at møgulig burturbeining av valtilfari fer fram í samráð við Landsskjalasavnið.

Til § 34

Ógreitt er, hvat ætlanin er við ásetingini. Viðmerkingarnar geva ikki nakra avklároing.

Til § 36

Sama viðmerking sum til § 3 stk. 1.

Eiga kommunur, sum skulu leggja saman, ikki hava eitt felags valstýri?

Til § 41 stk. 2

Orðingin løgtingsnevnd er helst komin skeivt fyri.

Til § 46

Í staðin fyri kravið um, at kommunustýrið skal løna hjálparfólki eftir ásetingum frá landsstýrismanninum, átti tað verið kommunustýrini sjálvi, sum avgjørdu, um tey skulu geva hesum fólkum samsýning. Annars kann hetta vera ein óbeinleiðis máti at leggja niður valstøð, sum fólk á staðnum ynskja at varðveita, men fólkavald í teimum fólkaríkaru pørtunum í kommununum meta vera óneyðug.

--oOo--

Samanumtikið er lítil ivi um, at tørvur er á at endurskoða partar av lógini fyri kommunuval. Hinvegin verður mælt til, at arbeiðið við at endurskoða lógin verður gjørt gjøllari, við nærri greinginum av møguleikum og avleiðingum, og servitan frá bæði serkønum og fólkavaldum, ið tryggja, at besta úrslitið fæst burturúr.

Vegna

Kommunufelagið

Heðin Mortensen — Formaður

Eyðun Christiansen — Stjóri